# BILAR

SAMBAND
magnus gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

RÁS 2 BILRADIO
HÓSDAGUR 4. MARS KL. 16:10

# Mercedes við hydrogen-generatori

**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10**

Í sendingini er Bilradio í Kollafirði, har samrøða er við Hans Madsen, sum hevur ein Mercedes við sonevndum hydrogen-generatori.

Hydrogen-generatorin virkar soleiðis, at vatn verður spaltað í sjálvum generatorinum og síðan ført víðari til brennievnisskipanina í motorinum. Hetta gevur motorinum meira orku og reinari forbrennig, samstundis sum bilurin koyrir longri upp á liturin av brennievni, og CO2-útlátið er munandi lægri.

Í sendingini siga Beinir Hansen og Bergur Danielsen frá Bildeildini á Tekniska Skúlanum sína hugsan um hydrogen-generatorar.

*mg*



*Hydrogen-generatorin fyllir ikki nógv í motorrúminum*



*Hans Madsen í Kollafirði við sínum Mercedes við hydrogen-generatori*




*Beinir Hansen og Bergur Danielsen frá Bildeildini á Tekniska Skúlanum*

# Ferðslutrygd í Perluni

**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10**

Bilradio vitjaði í Perluni í Tórsgøtu, har Ráðið fyri Ferðslutrygd skipar fyri undirvísing av næmingum í 8. flokkunum kring landið.

Hendan dagin vóru 8. flokkar í Runavíkar Skúla sum fingu undirvísing í ferðslutrygd.

Umframt Kemm Poulsen, sum er instruktørur og undirvísari hjá Ferðslutrygd, undirvístu eisini Benny Ejdesgaard, koyrilærari, Petur av Kák, ambulansuviðgeri og Karl Leonsson frá politinum.

Eisini fortaldi Jákup Thomasen úr Sørvági sína søgu. Samrøða er eisini við Dan Petersen, lærara í Runavíkar Skúla.

*mg*





*Petur av Kák ambulansuviðgeri*

*Karl Leonsson frá politinum*



*Benny Ejdesgaard koyrilærari*